# Minnislepi

## Lær at brúka Analyseruden

Talgild heilsuskipan

| STIG | SKÍGGJAMYND |
|---|---|
| **Analyseruden** er ein síða, har tú kanst seta saman ymiskar vísingar, t.d. heilivág, laboratoriusvar og mátingar í eina grafiska mynd. |   |
| Við at trýsta her, (sí mynd) kanst tú síggja frymlar, sum longu finnast. Tað ber til at seta stjørnu við eina ella fleiri skabelónir og gera tær til tínar favorittar.<br>Til ber eisini at umbiðja nýggjar frymlar á deildar- ella klinikaraniveau. Hetta so tað er lættari at finna tað, sum er viðkomandi fyri arbeiðið á staðnum. |   |
| Virðini í einum frymli kunnu samanberast til dømis í ymiskum stabbum og punktum, og kunnu soleiðis gera grundarlag fyri víðari viðgerð. |   |

Við zoom-linjuni kanst tú síggja eitt styttri ella longri tíðarskeið, og á tann hátt fáa betri innlit í eitt ávíst tíðarskeið.




Við at trýsta á pílin, kanst tú opna eitt parametur og soleiðis síggja mátingarnar á júst hesum parametri sum ein graf.

Tú kanst sjálvur broyta, hvussu raðfylgjan er fyri, hvussu virðini skulu vísast við at halda músini á virðinum, hála tað upp ella niður og sleppa músini aftur.




Tú kanst eisini taka eina verandi skabelón og tillaga hana til tín tørv til dømis við at leggja parametur afturat. Tá broytist hon bert fyribils, tvs. at næstu ferð tú loggar á, verður hon aftur, sum hon er sett at vera.




Trýst á pílin, so vísast analysur, ordinatiónir og klinisk parametur, sum eru skrásett á sjúklingin.



| | |
|---|---|
| Toga við músini tey virðir yvir í skabelónina, sum tú vilt síggja afturat. Hetta er bert ein fyribils vísing og er burtur aftur næstu feð tú brúkar analysuruden. | |
| Við at trýsta á minusteknið, kanst tú fjerna eitt virði úr skabelónini. |  |
| Í staðin fyri at tillaga eina skabelón, kanst tú eisini velja frítt, tvs. seta ymiskar samansetingar saman frá ferð til ferð. Tað gert tú við at toga tey upp á pláss við músini.<br><br>Hetta kann bert gerast sum fyribils virðini verða ikki goymd sum skabelón til at brúka seinni |  |